# DRAMATIKKUR

**FIMLEIKUR** Bara 0,01 stig var á muni, tá smágenturnar hjá Havnar Fimleikafelag A vunnu samanlagt á Støkk A í steypakappingini í estetiskum fimleiki. Fimleikararnir kappaðust í ítróttarhøllini í Runavík um vikuskiftið

Hilmar Jan Hansen







Tað gjørdist spenningur til tað síðsta í steypakappingini hjá smágentum í gjár, har kappingin stóð millum Havnar Fimleikafelag A og Støkk A, ið vóru klárt tey bæði bestu liðini. Fyrru steypakappingina vunnu tær hjá Havnar Fimleikafelag, men hesa ferð høvdu tær hjá Støkk munin og vunnu. Tá so alt skuldi teljast saman, gjørdist tað so spennandi, sum tað fekk verið.

– Her var bara 0,01 stig á muni, og tað er so tætt, at tað kanska bara eina ferð er komið fyri fyrr, men tað er øgiliga langt síðani. Vit vistu, at hesi bæði liðini vóru so sera jøvn, so tí høvdu vit tikið eitt eyka steyp við, skuldi tað hent, at tað stóð á jøvnum, sigur Katrin Abrahamsen, sum í nevndini hjá Fimleikasambandinum hevur ábyrgdina av estetiska fimleikinum.

– Hetta bleiv so spennandi, at vit máttu halda ondini, meðan vit bíðaðu eftir samanteljingini, ið altso gav Havnar Fimleikafelag A tann teprasta sigurin, tú kanst fáa. Tað, sum smágenturnar vístu hesa ferð, prógvar veruliga, at tað er her, vit síggja eina sera ljósa framtíð fyri estetiskan fimleik. Her er veruliga nakað gott á veg.

Katrin Abrahamsen staðfestir, at steypakappingarnar í ár hava víst, at tað veruliga hendir nakað á økinum, og at talan er um fimleik á høgum stigi.

– Fimleikararnir gera nógv við tað og venja dúgliga, og her er so javnt millum nógv av liðunum, at einki teirra kann seta seg afturá sum favorittur, tí tey noyðast øll at kýta seg. Nú verður øgiliga spennandi at síggja, hvønn veg tey ymsu liðini hava flutt seg, tá FM-kappingin verður fyrst í mai mánaði. Tað, sum vit hava sæð í Runavík um vikuskiftið, boðar bara frá góðum, so vit gleða okkum, sigur hon.

## Tætt aðrastaðni við

Hjá kvinnum høvdu bara Havnar Fimleikafelag og Ljósið lið við leygardagin, og her vann Havnar Fimleikafelag greitt. Leygardagin fekk liðið betri karakterir fyri bæði teknisku og listarligu avrikini, umframt fyri framførslu. Har-



